# Spurningurin snýr seg um álopið

**Føroyska landsliðið er farið í holt við fyrireikingarnar til stóru uppgávuna mikudagin. Eingir skaðar hótta, og størsti spurningurin er helst, hvør verður álopsmakkarin hjá John Petersen hesaferð**

TÝSKLAND-FØROYAR
*Jákup Mørk*
*Álvur Haraldsen*



*Pól Thorsteinsson fekk ein lítlan skað í dystinum leygardagin, men hann var partur av venjingini longu mánadagin, og hann roknaði við at vera tøkur hjá Henrik Larsen til dystin mikudagin*

**HANNOVER:** Føroyska fótbóltslandsliðið fór mánadagin av álvara undir fyrireikingarnar til stórdystin mikudagin. Sunnudagin varð fyri tað mesta nýttur til at lekja sálarligu sárini eftir Litava-dystin, og so sjálvandi eisini til at ferðast í, og mánadagin byrjaðu venjingarnar so aftur.

Landsliðið heldur í hesum døgum til á Hotel Fürstenhof í Zelle, sum er ein býur einar 50 kilometrar uttan fyri sjálvt Hannover, og staðið, har venjingarnar ganga fyri seg, eitur der Walter Bismarck Stadion. Til stuttleikar kann nevnast, at tey við leikvøllin tóktust vera eitt sindur errin av, at eitt landslið hevði valt at leggja venjingarnar her. Einasta landsliðið, sum áður hevði nýtt vøllin, var kinverska kvinnulandsliðið, sum var her fyri nøkrum árum síðani.

### Fá ivamál

Onkur nevndi sunnudagin, at tað skuldi vera gott at koma úr litaviska heystarkuldanum, men væntaðu tey, at veðrið skuldi verða betri í Hannover, so fóru tey í øllum førum skeiv.

Mánamorgunin var bítandi kalt á annars framúr góða Bismarck-vøllinum, og til at verja seg ímóti hesum vóru flestu av leikarunum ílætnir húgvu og handskar, til tess at verja seg ímóti nógva kuldanum.

Sum so góvu venjingarnar onga ábending á, hvussu liðið leygardagin fer at síggja. Tað gera tær vanliga ikki, nú Henrik Larsen er venjari, og higar til hevur tað í hvussu so er verið so, at teir fyrstu ellivu ikki eru avdúkaðir fyrr enn undir seinastu venjingini, sum er eftir evstamark okkara.

Í hópinum eru annars ikki tey stóru ivamálini. Jákup á Borg hevur havt ein skaða í lærkrikanum at dragast við seinastu tíðina.

*Framhald á síðu 23*

# Pól nýggjur í 25-felagnum

**NSÍ verjuspælarin er 20. spælarin, sum hevur rokkið fjórðings hundrað landsdystum síðani altjóða limaskapin í 1988**

TýSKLAND-FØROYAR
*Jóannes Hansen*

Hóast hann eftir Litava uppgerðina leygardagin hevur havt smávegis trupulleikar at dragast við, so man lítil ivi vera um, at Pól Thorsteinsson verður ímillum teir fyrstu ellivu, sum fara at ganga inn á vøllin í kvøld, tá Føroyar fara at standa fyri størstu altjóða avbjóðingini nakrantíð.

Uttan mun til hvussu tað fer at tørna út, so fara allir spælararnir ivaleyst altíð at minnast til ta ferðina, tá teir stríddust ímóti varaheimsmeistarunum á útivølli. Og fyri Pól Thorsteinsson er dysturin eisini minnisríkur á tann hátt, at hetta verður 25. ferðin, at hann fer at umboða føðilandið.

Síðani fyrsta altjóða skrásetta landsdystin ímóti Íslandi 24. august í 1988 á Akranesi hava Føroyar spælt 83 landsdystir, og í teimum hava 79 spælarar verið við. Pól er tann 20., sum røkkur 25 landsdystum. Hann var fyrstu ferð á landsliðnum í HM undankappingardystinum á Malta 30. apríl í 1997. Tá kom Pól so at siga sum eitt skot á landsliðið, har hann ongantíð áður hevði verið.

Merkisvert var tað, at Pól Thorsteinsson spældi fimtan dystir á tamb, áðrenn hann fyrstu ferð varð útskiftur. Pól hevur verið vongverji og miðverji, men tá Estland í 1999 vann 2-0 á Tórsvølli, setti Allan Simonsen hann á vongplássið í vinstru. Tað var ikki rætta plássið hjá Póli, og hann varð útskiftur, tá eitt stórt korter restaði.

### Kostaði tólv dystir

Um alt hevði lagað seg væl, so hevði Pól Thorsteinsson havt spælt 25 landsdystir í 5-1 tapinum í Sveis í fyrraárið. Men eftir samanbrest við Patrick Berger í Prag leygardagin 9. oktober í 1999 varð Pól rikin av vøllinum, og í kjalarvørrinum á útvísingini misti Pól tólv landsdystir.

Hann var leikbannaður í trimum undankappingardystum. Í hesum tíðarskeiðnum spældu Føroyar fýra venjingardystir, sum Allan Simonsen og Pól Thorsteinsson vóru samdir í, at Pól ikki skuldi luttaka í. Leikbannið var av, tá Føroyar høvdu spælt í Luksemborg 24. mars í fjør. Pól var aftur á liðnum í Moskva 28. mars, men so gav hann avboð. Hann var ikki samdur við FSF í, at hann ikki skuldi eiga part í bonusupphæddini fyri at vinna í Luksemborg.

Tá Henrik Larsen var vorðin venjari, kom Pól aftur á landsliðið. Tað hevði kanska serligan týdning fyri avgerðina, at hjálparvenjarin á landsliðnum, Jógvan Martin Olsen, var venjari í NSÍ, har Pól Thorsteinsson var fastur maður á liðnum.

### Royndasta liðið

Óli Johannesen fór leygardagin ein dyst frá Jens Martini Knudsen í kappingini um at vera fyrsti føroyingurin at røkka 60 landsdystum. Í kvøld verður Óli fyri 59. ferð á landsliðnum. Um Jákup Mikkelsen verður málverji, og Jens Martin Knudsen verður á beinkinum alla tíðina, so verður Jens Martin standandi á 56 landsdystum.

Hjá summum er tað hugaligt at spæla við hagtøl. Ein hugsan, sum ongantíð kann gerast til veruleika, er at seta eitt landslið, sum er mannað við teimum ellivu, sum hava verið oftast á landsliðnum. Í 3-4-3 uppstilling kundu teir ellivu mest royndu mannað hetta liðið: Jens Martin Knudsen (56) - Jan C. Dam (39), Óli Johannesen (58), Jens Kristian Hansen (43) - Allan Mørkøre (54), John Petersen (42), Julian Johnsson (46), Øssur Hansen (50) - Uni Arge (37), Kurt Mørkøre (37), Todi Jónsson (43).

Tað verður ein løta, áðrenn nakar annar hevur møguleika at sleppa upp í part á hesum liðnum. Av teimum, sum eru við í Týsklandi, er Jákup Mikkelsen við 27 landsdystum næstur. Men trupulleikin hjá honum hevði verið, at hann skal yvirtrumfa Jens Martin Knudsen við 56 dystum, áðrenn tað hevði komið upp á tal at komið á royndasta liðið!

Av spælarunum úti á vøllinum hevði Pól Thorsteinsson verið næstur plássið á tankaliðnum. Og um leikbannið í Kekkia ikki hevði havt kostað honum tólv dystir, so hevði hann longu eftir dystin í kvøld havt sama rætt at verið á hesum upphugsaða liðnum, sum Kurt Mørkøre og Uni Arge nú eiga.

Í føroysku 1. deildini hevði omanfyri standandi liðið ivaleyst framvegis staðið seg hampuliga væl, men teir høvdu gjørt lítið við Týskland!



*Framhald av síðu 22*

Men hann spældi í Litava eftir at hava fingið pínudoyvandi, og tað gekk so hampuligt, hóast hann framvegis var nakað eymur mánadagin, og tískil bara rann einsamallur mánadagin.

Pól Thorsteinsson hevði nakað av krími undir dystinum í Litava, og í dystinum varð hann skiftur út við einum smávegis skaða, men alt hetta tykist nú vera komið í rættlag. Mánadagin tók hann fyri ein part lut í venjingunum, men hann gavst nakað fyrr enn hinir, men sjálvur helt vágbingurin ikki, at talan var um nakran stórvegis bága, og hann roknaði við at vera tøkur mikudagin.

### Møguliga ein broyting

Hetta gevur so í øllum førum Henrik Larsen ein positivan trupulleika, tá hann skal seta liðið mikudagin, tí eingin spælari hevur so meldað frá frammanundan. Men hóast tað ikki gekst heilt eftir vild í Litava, so er ikki serliga sannlíkt, at talan verður um tær stóru broytingarnar. Heldur ikki hóast allir tríggir skiftisleikararnir, sum komu inn á vøllin í Kaunas gjørdu tað heilt gott, og so avgjørt vístu seg sum góð alternativ til ideal-uppstillingina.

Skal nøkur broyting fremjast, so er kanska hugsandi, at talan tá verður um, at Christian Høgni Jacobsen ikki byrjar inni hesaferð. Avloysarin kundi verið Andrew av Fløtum, sum gjørdi tað gott, tá hann kom inn leygardagin, men umframt hann eru bæði Helgi L. Petersen og Hjalgrím Elttør kanska evni til plássið á toppinum. Her talar tað kanska til fyrimuns fyri Christian Høgna, at kappingin hjá Vejle framvegis er í gongd, men hinvegin er Andrew jú toppkjúttin í føroyski landskappingini, meðan Christian Høgni fyri tað mesta er bakkur, tá hann er í byrjunaruppstillingini hjá Vejle.

### Helst lítið øðrvísi

Annars vóru bæði Julian Johnsson og Pól Thorsteinsson skiftir út leygardagin, og í báðum førum tóktust hesar útskiftingar at vera gagnligar fyri føroyska spælið, men tað er neyvan hugsandi, at Henrik fer at kvetta hesar av liðnum eftir ein dyst. Serstakliga á miðvøllinum kunnu broytingar vera tungar at fremja, og á høgra bakki var Pól Thorsteinsson slúkaðður beinleiðis inn á plássið, eftir at júst Jóhannis Joensen hevði spælt ein góðan dyst móti Liktenstein í fyrsta landsdystinum hjá Henrik Larsen.

Seinasta lítla ivamálið kundi verið málverjasessurin, men tá grundgevingin fyri at taka Jákup Mikkelsen framum Jens Martin Knudsen var, at Jákup fær sparkað longur undir trýsti, er illa hugsandi at støðan er broytt. Í øllum førum man landsliðsvenjarin rokna við, at týskarar fara at legja trýst á.

So alt í alt bendir tað tann vegin, at talan verður um somu byrjunaruppstilling sum leygardagin. Men tó møguliga við teirri lítlu broyting, at Andrew av Fløtum byrjar inni í álopinum saman við John Petersen.

∆

## Gongdin í okkara bólki

**Føroyar-Skotland 2-2 (2-0)**
1-0: John Petersen, 7.
2-0: John Petersen, 13.
2-1: Paul Lambert, 62.
2.2: Barry Ferguson, 83.

**Litava-Týskland 0-2 (0-1)**
0-1: Michael Ballack, 27.
0-2: Marius Stankevicius, 59. (sjálvmál)

**Litava-Føroyar 2-0 (2-0)**
1-0: Tomas Razanauskas, 23.
2-0: Robertas Poskus, 37.

**Ísland-Skotland 0-2 (0-1)**
0-1: Christian Dailly, 7.
0-2: Gary Naysmith, 63.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Skotland | 2 | 1-1-0 | 4-2 | 4 |
| Týskland | 1 | 1-0-0 | 2-0 | 3 |
| Litava | 2 | 1-0-1 | 2-2 | 3 |
| Føroyar | 2 | 0-1-1 | 2-4 | 1 |
| Ísland | 1 | 0-0-1 | 0-2 | 0 |




*Eftir at týsku miðlarnir í vikuskiftisútgávunum gjørdu nógv burturúr føroyska liðnum og leikarunum, tóktist hetta at vera heldur friðarligari mánadagin*

# Týskarar hugsa um Ballack

**Stóru boðini í týsku bløðunum tykjast vera, at Michael Ballack er komin seg eftir krímið, men nakað er framvegis at hoyra um Føroyar og føroyskan fótbólt**

TÝSKLAND-FØROYAR
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen*

**HANNOVER:** Tað tykist, sum um týsku fjølmiðlarnir royndu at spara eitt sindur upp á krútið fyrrapartin av vikuni, nú landsliðið skal royna seg móti Føroyum.

Í øllum førum hevur umrøðan av komandi dystinum fingið nógv minni pláss í mánadagsútgávunum, enn hon hevði í eitt nú vikuskiftisútgávunum. Allarhelst er eisini bert talan um eina løtu, har miðlarnir skulu hvíla seg, fyri síðani at seta meira ferð á bæði týs- og mikudagin.

Í mun til vikuskiftisútgávurnar, so var umrøðan av Føroyum millum lítil og eingin í mánadagsútgávunum. Talan var eisini bert um nøkur heilt fá fjølmiðlafólk til føroysku venjingarnar mánamorgunin, og tann umrøðan, sum var í miðlunum, snúi seg eisini at kalla bert um týska liðið.

Her var størsti boðskapurin, at stóra stjørnan á liðnum, Michael Ballack, er tøkur aftur, eftir at hann lá sjúkur við krími, tá týskarar spældu vinardyst móti Bosnia-Hersegovina.

### Hevur gjørt heimaarbeiðið

Einasta blaðið, sum tóktist fara eitt sindur djúpari í sínari viðgerð av dystinum, var Bild, sum longu nú hevur gitt, hvussu týska liðið fer at síggja út. Og tað er ikki hissini fólk, sum Rudi Völler sambært blaðnum ætlar at senda á vøllin.

Í eini 4-4-2 uppstilling fer liðið at síggja soleiðis út: Oliver Kahn - Marco Rehmer, Christian Wörns, Carsten Ramelow, Torsten Frings - Bernd Schneider, Michael Ballack, Dieter Hamann, Jens Jeremies - Miroslav Klose, Carsten Jancker.

Tað er í hesum sambandi vert at bíta merki í, at Rudi Völler eftir øllum at døma hevur hugt eftir, hvørjar trupulleikar føroyingar høvdu av dystinum í Litava.

Har var tað serliga kropsliga styrkin hjá álopinum, sum órógvaði okkara verju, og ivaleyst er hetta orsøkin til, at venjarin tykist rokna meira við stóra og sterka Carsten Jancker, heldur enn at nýta lítla og kvika Oliver Neuville við síðuna av Miroslav Klose.

Og at Völler hevur gjørt heimaarbeiðið kom eisini til sjóndar, tá hann á fyrsta tíðindafundinum mánadagin varð spurdur, hvørt hann hevði biðið um nøkur ráð frá fyrrverandi landsliðsvenjara sínum. Hesin er nevnliga Berti Vogts, sum nú hevur ábyrgdina av skotska liðnum.

– Nei, eg havi ikki tørv á nøkrum ráðum frá Vogts. Vit vita alt tað, sum vit skulu vita um føroyska liðið, og tað er nóg mikið hjá mær.

### Øll skriva um føroyska liðið

Var lítið gjørt burturúr í mánadagsútgávunum, so var støðan eitt sindur øðrvísi um vikuskiftið. Mestsum øll tey týsku bløðini høvdu tá greinar um føroyska liðið, og serliga var áhugin fyri John Petersen stórur, eftir at hann hálvgum søkti skotsku skútuna. Sostatt helt John fyri, tá Bild umvegis Sosialin undir einum av venjingunum í Litava vildi frætta, hvat hann helt um Týsklands-dystin, at hóast hann hevði verið nógv frammi, so hevði Bild enn ikki verið við, so tað mátti hann heldur geva sær stundir til.

At svørini hjá John til spurningarnar ikki vóru heilt í samsvari við tað, sum stóð at lesa í blaðnum, er so ein onnur søga, men hetta sigur kanska eisini nakað um, hvussu høgt bløðini vilja spenna bogan í royndunum at fáa bestu yvirskriftirnar.

Millum fleiri aðrar áhugaverdar greinar um Føroyar, føroyskan fótbólt og føroyskar fótbóltsleikarar, var eisini ein heil síða í stóra ítróttarblaðnum, Bild Sport. Her høvdu útsendingar hjá blaðnum hitt Henrik Larsen, John Petersen, Jens Martin Knudsen og Jákup á Borg sum umboð fyri føroyska liðið, og so eisini Tønnis Wardum, sum føroyskan fótbóltsáskoðara.

### Henrik hevur vunnið

Flestu spurningarnir, sum settir vórðu, vóru av slíkum slag, sum eru meira upplýsandi fyri týska lesaran, enn teir eru fyri føroyingin, men mitt í øllum hesum var tó ein lítil viðmerking, sum enn ikki hevur verið frammi.

Henrik Larsen hevur meira enn eina ferð vunnið á Rudi Völler, tá teir báðir hava dystast. Í EM-finaluni í 1992 var Larsen sjálvandi á danska liðnum, sum basti Týsklandi, og tá teir báðir núverandi landsliðsvenjararnir spældu fótbólt í Italia, eydnaðist eisini okkara manni at basa teirra. Henrik Larsen spældi tá við Pisa, men hóast hetta var at meta sum eitt av veikaru liðunum í seriu A, so eydnaðist teimum at vinna 2-0 á útivølli móti stórfelagnum, Roma, har Völler var partur av einum stjørnusettum liðið. So Henrik hóast hann í báðum førum varð mettur at vera við undirlutan, so hevur tað altso eydnast Henrik Larsen at basa týska stórveldisharranum, og so er spurningurin, hvørt hetta letur seg gera aftur mikudagin.